Býráðið yvirtikið Hoyvíkshagan

Eigarafelagið Hoyvíkshagin-Suður kallaði týskvøldið inn til eykaaðalfund. Á fundinum ætlaði nevndin at leggja frá sær, men broyttar umstøður høvdu við sær, at nevndin varð øll afturvald

ÚTSTYKKING
Ingrid Bjarnastein

Nevndin í eigarafelagnum Hoyvíkshagin-suður hevði áðrenn týskvøldið avgjørt at leggja frá sær. Hetta komst av, at nevndin áhaldandi hevði roynt at gjørt eina avtalu við Tórshavnar Býráð um at yvirtaka útstykkingina í Hoyvíkshaganum, men býráðið hevði gjørt greitt, at hetta ynskti tað ikki.

Av tí at nevndin sjálv metir seg ikki hava neyðuga førleikan fyri at standa fyri útstykkingini, umframt at flestu limirnir í nevndini hava krevjandi størv dagliga, hildu teir ikki, at tað var ráðiligt at standa fyri eisini so stórari útstykking.

Men áðrenn eykaaðalfundin týskvøldið, hálsaði alt brádliga um.

– Vit vóru á fundi við býráðið klokkan 16, og tá høvdu teir broytt meining, og vildu yvirtaka útstykkingina. Harafturat hevði býráðið valt, at avseta ein verkfrøðing av til at arbeiða burturav við hesum, og hetta gjørdi, at allar fortreytir brádliga vóru broyttar, sigur Árni Rasmussen, nevndarlimur.

Á fundinum heitti Jan Christiansen, borgarstjóri nevndina um, at stilla uppaftur, og tá fortreytirnar nú vóru heilt øðrvísi, gjørdi nevndin, sum borgarstjórin ynskti. Allir nevndarlimirnir vóru afturvaldir, undantikið ein, sum hevði valt at fara úr nevndini fyri nakað av tíð síðani.

– Vit eru sjálvandi glað fyri hetta, tí hetta var tað, vit ynsktu. Og vit hava eisini fingið okkara ynskið uppfylt, so at siga, sigur Árni Rasmussen.

Dýrt í Havn

Seinastu 20-30 árini hevur tað verið soleiðis í Havnini, at tá ein kommunal útstykking hevur verið gjørd, so er eitt eigarafelag stovnað samstundis, sum kemur at umboða allar eigararnar. Teir velja so eina nevnd, sum stendur fyri útstykkingini.

– Hetta mynstrið hevur riggað væl seinastu árini, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Men av tí, at tað verður altið goldin ein netto-prísur fyri grundstykkini, umframt at mvg skal gjaldast, sum er 25%, so koma grundstykkini í Havn at kosta 100.000-200.000 krónur meira enn í Havn enn á bygd, har kommunan spýtur pengar í eisini, vísir Jan Christiansen á.

Nýggja mvg-lógin er soleiðis háttað, at um kommunan ger eina útstykking, so skal hon gjalda 6,25% í mvg, meðan eigarafelagið skal gjalda 25%. Tí verða grundstykkini nógv dýrari enn aðrastaðni, har bara 6,25% eru at gjalda í mvg.

– Tá nevndin í Eigarafelagnum Hoyvíkshagin-Suður vil leggja frá, so er tað skjótt at rokna út, at vit fáa ikki fimm onnur at taka yvir. Í býráðnum vórðu vit samd politiskt um at taka yvir, tí hetta er tann einasta loysnin, sigur Jan Christiansen.

Verkfrøðingastovan hjá Magnus Paula Gaard fer innan fyri næstu tvær vikurnar at bjóða arbeiðið út, og tá skuldi verið klárt at stykkja út í Hoyvíkshaganum.

Havnar Bóltfelag
Innadurvenjingar veturin 2002/03
Fríggjadagin 8. november byrja innanduravenjingarnar hjá teimum yngstu aftur.

Venjingartíðir:

Fríggjadag í Badmintonhøllini
kl. 15.00 - 15.45 Smápiltar (94)
kl. 15.45 - 16.30 Smápiltar (93)
kl. 16.30 - 18.00 Piltar (91-92)
kl. 18.00 - 18.45 Gentur 10-12 (91-92)
kl. 18.45 - 19.30 Smágentur (89-90)
kl. 19.30 - 20.30 Smádreingir (89-90)
kl. 20.30 - 21.30 Dreingir (87-88)
kl. 21.30 - 22.30 Gentur/Kvinnur (87 og áðrenn)

Hósdag í høllini í HB-húsinum
kl. 18.00 - 19.00 Gentur 8-10 (93-94)

Les meira um venjingartíðir og venjarar á heimasiðuni www.hb.fo

Havnar Bóltfelag

Í Býin
Tilboð
Tilboð út úr húsinum ella í matstovuni
Fritt val
98,-
Casablanca
NÁTT-BUSSURIN
Tlf. 424254
Bussarnir: Tlf. 288254
AUTO -Dag & nátt-
Minnist til gamla siðin við mortansdunnuni
Mortansdunna
leygarkvøldið 9. nov. og sunnukvøldið 10. nov.
Sum nakað nýtt fara vit hesaferð at burðreiða leskiliga rættin á sjálvtakuborðinum í matstovuni.
Etið so nógv tygum orka 185,- fyri hvønn
Verið hjartaliga vælkomin!
Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33
HOTEL HAFNIA

Í Býin Í Býin Í Býin
HESA VIKUNA
Høskvøldið
Ókeypis aygongd millum kl. 21-22 DJ Frisko
Fríggjakvøldið
Ladies night kl. 23.00 -01.00 DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið
Rockara & Punkara Kvøld DJ Marin Kjærbo
Ólava, tá ikki kann lyssast við er til rockarar / punkarar
Staðið við hálvum prísum alt kvøldið
Caffin i Club 20 er opinc Hósd. 17-24, fríggjad. 17-04, leygard. 14-04, sunnud. 14-24
Discoteque er opinc Hósd. 21-24, fríggjad. 23-04, leygard. 23-04
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo
Matseðilin
Hósdagin 7. nov: Revelsbein
Fríggjadagin 8. nov: Wienersnitsel
Leygardagin 9. nov: Nakkasteik
Mánadagin 11. nov: Kjøtfrikadellir
Tysdagin 12. nov.: Høsnarungi
Mikudagin 13. nov: Gyros
Seinnaparts-TILBOD frá kl.14.00:
Juniorburgari 20,00
Maxiburgari 28,00
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

fríggjakvøldið 8/11
Discoteque v/ Gunnar & Havgrími
"BIIP"-dagur frá kl. 23-01
ØLL ÓKEYPIS ATGONGD
áðrenn kl. 01.00
leygarkvøldið 9/11
KJØLAR (live)
Eisini er Discoteque
Øll tey gamlu hittini verða at høyra og nógv onnur
TILBOÐ: sí www.platform.fo
PLATFORM
Manhattan PUB & CAFÉ
Livandi tónleikur
Jógvan Nolsøe
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverriggata • Tórshavn
Tel 31 96 96
Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjakvøldið 8. nov.
Fimmari "J-dagur"
kl. 19 Sjavskapping
Dansur frá 24-04, "ATLAS" spælir
Leygarkvøldið 9. nov.
Kl. 19 verður upptøka av nýggjum limum
Til dansin spæla "ATLAS"
Ókeypis atgongd árenn miðnátt
aldursmark 18 ár
Happy Hour frá 22-23 · Ladies Night
Sunnudagin 10. nov.
Opið frá kl. 17-23
16. nov.
· Ræstkjøtaveitsla
tekningarlist liggur í barrini
Kaggin
Hóskvøldið spæla
Jens Marni Hansen, Kim Hansen
James Olsen & Faðir Magnussen
Double-up frá 21.30-22.30
Ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
Fríggjakvøldið spæla
Ólavur Østers Band
Ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
Leygarkvøldið spæla
Ólavur Østers Band
J-dagur fríggjadagin kl. 17.00
Fótbóltur á stórskiggja
www.kaggin.fo
Í Býin
- hvønn hósdag